## DAGSINS MEINING

# Sláið kalt vatn í blóðið

Í hesum døgum fáa vit helst at vita, um triðja boringin á landgrunninum hevur givið úrslit. Tað hevur gingið væl at bora hjá Amerada Hess. Spurningurin er, um hetta eisini merkir, at man hevur troffið við nakað áhugavert ella beint tvørturímóti bara hevur borað niður gjøgnum lítið áhugaverd løg ol.

At einki er likið út kundi bent á, at tað ikki sær alt ov gott út. Tvs. at føroyingar og umheimurin annars mugu gera seg út við enn størri toli, tá tað ræður um at finna olju her. Tríggir turrir brunnar eru sjálvandi ikki nakað gott úrslit. Tvørturímóti. Men teir eru so kortini “bara” tríggir. Hyggja vit at øðrum økjum, har tað verður borað fyri fyrstu ferð, hoyrir tað meira til undantøkini, at olja verður funnin eftir bert tríggjar boringar.

Verður eingin olja funnin í triðja brunninum kann tað bava bæði hepnar og óhepnar avleiðingar. Tað eru tey, sum fara at siga, at so mikið nógv virksemi er í landinum í løtuni, at stór oljufund høvdu bara fingið bikarið at flóta yvir. Tað hevði skundað undir yvirupphitingina. Hinvegin eru tað sjálvandi mong vinnulívsfólk, sum hava brúkt tíð og orku til eina slíka avbjóðing, tó at tey ikki hava gjørt stórar íløgur í so máta. Og so eru tað sjálvandi útlendsku oljufeløgini. Man kann siga, at hetta eru tey von við og at tey tola bæði ein og fleiri turrar brunnar at byrja við. Kortini gevur hetta eitt óheppið signal úteftir, tí møgulig oljufeløg, sum høvdu kunnað hugsað sær at verið við í eini aðru útbjóðing tá vilja setast aftur. Eisini kann hugsast, at verandi oljufeløg eru ikki so heit fyri at bora allar brunnarnar tey longu hava játtað nú tað er ikki ókent aðrastaðni, at feløg, sum hava bundið seg at bora fleiri brunnar - aftaná turrar brunnar - royna at sleppa undan at bora fleiri.

Samanumtikið er tað eingin vanlukka verður eingin olja funnin á hesum sinni. Hetta er bert byrjanin. Hóast bert ein brunnur skal borast her næsta ár, verða nógvir boraðir beint við markið. Og tað er greitt, at gerast hesir oljufund, vil áhugin fyri Føroyaøkinum aftur vaksa. Og tað er spennandi at frætta, hvussu gongst hjá BP og Shell, sum bora Assyntbrunnin hinumegin markið. Samfelagshjólini koyra víðari, hóast olja ikki verður funnin í hesum umfarinum. Vit hava so gjørt okkara heimaarbeiði væl, og tað er eitt pluss, at ongar stórar íløgur eru gjørdar í nakað, sum vit enn ikki vita er til. Tað er helst rætt at sláa kalt vatn í blóðið og ikki síggja tríggjar miseydnaðar boringar sum nakra vanlukku. Vit hava tíðina fyri okkum. Men oljuinntøkurnar vóru ætlaðar at vera enn eitt bein undir føroyska búskapinum. At hesar ikki í dag eru so átroðkandi merkir ikki, at brúk ikki verður fyri teimum um nøkur ár. Tí eiga vit at halda fram við leitingini og her m.a. skunda undir eina komandi útbjóðing.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hví man Høgni spyrja?

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokkurin*



Varaløgmaður Høgni Hoydal er farin at seta sambandspolitikarum spurningar, so í Sambandsflokkinum eru vit ikki í iva um, at teir eru settur til okkara. At tað er lítið virðiligt ella álitisvekjandi at vera nevndur sambandspolitikari, sum formaður Javnaðarfloksins vil vera við, má standa fyri hansara egnu rokning,Vit í Sambandsflokkinum eru tvørturímóti errin av heitinum, tí vit hava og hava altíð havt eina greiða støðu í tí spurninginum sum einasti flokkur, so veljarin hevur ongantíð skula ivast, hvar vit standa.

Vit hava eisini hildið fast við sama heiti øll árini, meðan stórar broytingar eru hendar í politisku søgu Føroya.

Nú er so tíðin komin til nýggjar broytingar, og eisini í tí arbeiðnum vilja vit gera okkara ávirkan galdandi, men at sleppa okkara endamálsgrein sum sambandsflokkur fara vit ikki.

**Spurningarnir**
Fyri at venda aftur til spurningarnar frá Høgna Hoydal, so er ivaleyst endamál hansara, at hann skal hava svar, sum hann vil hava at venda tann vegin, sum hann vil. Tí svarini kennir hann áðrenn, ongin ivi um tað.

Tú hevur ikki lisið og tikið prógv um samskifti uttan at duga tað kynstrið !

Til spurning **1** og **2** er at siga, at vit hava eina heimastýrisskipan sum er eitt politiskt samráðingarúrslit millum tveir partar, har annar og minni parturin innan hesa skipan hevur havt møguleikar at menna seg í góðum samstarvi við hin, ið er eitt norðurlendskt, demokratiskt vælferðarsamfelag. Hetta samstarv innan sama ríki hevur givið ávís rættindi hvør hjá øðrum.

Hesi rættindi hava verið til fyrimunar fyri føroyingar.

Fíggjarligir spurningar hava eisini verið loystir partanna millum við samráðingum í nógv ár, men at tað altíð hevur verið uttan trupulleikar, skal ikki vera sagt her.

At illgitingar, misálit og brigsl hevur ávirkað samstarvið og samskiftið nógv seinastu árini, er tíverri veruleiki, og tað harmar okkum almikið. Hetta hava so gott sum allir føroyingar merkt á egnum kroppi, men hetta hevði borið til at rætta upp aftur og betra, um vilji var til staðar, ikki minst í Føroyum ! Men fullveldi hvørki loysir ella bjargar tí málinum.

Til spurning **3** kann stutt svarast: Vit eru ein tjóð, tað eru greið boð Sambandsfloksins. Hví skal Tjóðveldisflokkurin júka aftur og aftur, at vit ikki eru tað ? Tað kann bert sáa mistreysti, men tað er helst eisini tað, sum er endamálið hjá Høgna Hoydal.

Svarið til spurning **4, 5, 6** og **7** er, sum sagt var til fyrsta spurning: Vit hava eina heimastýrisskipan við nógvum møguleikum fyri broytingum, men hetta hevur sitandi samgonga ikki torað, megnað ella verið samd um at broyta.

Hví setir tú spurning nr. **8**? Hvør hevur noktað okkum at yvirtaka okkara fólkakirkju við øllum tí, sum harvið fylgir og við øllum valdi? vilja vit gjalda, so kann trupulleikin hjá Høgna verða loystur.

Eitt annað er, at Sambandsflokkurin ikki vil finna seg í, at ein føroyskur politiskur meiriluti einsamallur skal gera av, um vit skulu hava eina fólkakirkju í framtíðini.

Í Føroyum er pláss fyri ymiskum kristiligum samkomum, sum sjálvar skipa síni viðurskifti. Tað eru rættindi, sum tær hava. Tá talan er um okkara fólkakirkju, skal kirkjufólkið sjálvandi vera við til at taka avgerðir og ávirka, um kirkjan skal broytast, og hvussu hon skal virka. Og tað skal kirkjufólkið hava tíð til at viðgera og skifta orð um Tað ætlar sitandi samgonga ikki, at tey skulu. Hvar er nú tín virðing fyri fólkaræðinum, Høgni ?

Trúarlívið í Føroyum er ein sera eymur spurningur, sum ikki bara við einum politiskum pennastroki skal verða broytt, tí tað passar best í eina politiska skrá.

Og hví setir tú spurning nr. **9**? Er hatta ikki sum við spurningi nr. **3**, at tú vil sáa mistreysti og øsa?

Hasin spurningurin er avgreiddur Høgni Hoydal. Vit eiga undirgrundina!

**Betri samfelag?**
At formaður Tjóðveldisfloksins sigur seg vilja hava eitt betri og rættvísari samfelag, har fólkaræði skal galda, er tað sama sum at siga, at hatta er ikki galdandi í Føroyum í dag, og samstundis roynir hann at rættvísgera sínar ætlanir

Hóast hann ikki setir okkum tann spurningin, men bert staðfestir tað í greinini, so er okkara svar, at við hansara fram-ferðarhátti í sambandi við samráðingar, og hansara politisku framtíðarætlanum fyri okkara landi og fólki, so vilja vit av øllum alvi ávara móti tí, sum hendir við hesum landsstýri, har júst vandin fyri at missa møguleikarnar fyri einum góðum og rættvísum samfelag, har fólkaræði skal galda, er í stórum vanda.

# Skeivur maður endurgivin

Í grein um strandfaraskipið Ternuna í leygardagsblaðnum, var eitt navn komið skeivt fyri. Maðurin, sum Sosialurin tosaði við á teknisku deild hjá Strandferðsluni, eitur ikki Heri Andreasen, men Suni Andreasen. Við biðja orsakað mistakið.

**blðm.**


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Frá Erasmus Montanus til talibanus

**- við lip service ella loysingarskrøggi sum mantra!**

**Regin Eikhólm**



Undir yvirskriftini: "Útspilling spillir fólkaræðið" hevur varaløgmaður, Høgni Hoydal, eina viðmerking í Dimmalætting og Sosialinum 09.10.01, har hann átalar tað støðugt vaksandi útspillingina í politiska orðaskiftinum, og sum hann sigur ikki kann góðtakast.

At útspilling veruliga spillir fólkaræðið er varaløgmaður eitt gevandi dømi um, nú hann et al. í 3-4 ár hevur gingið á odda í eini grundleysari útspillingar herferð ímóti øllum tí, sum hevur samband við okkara 600 ára gamla ríkisfelagsskap. Tí man fáur taka hesa viðmerking frá varaløgmanni fyri annað enn lip service ella innantóm orð. Bara at vilja seg sjálvan er ein fólkaræðislig spilla í sjálvum sær og hevur onki við virðiligt fólkaræði at gera.

**Donsk imperialisma?**
Kenda parolan hjá varaløgmanni um at danir og ríkisfelagsskapurin eru rótin til alt ónt heldur áfram, sjálvt eftir at "Frágreiðingin um 80-árini" frítók danir og ríkisfelagsskapin fyri miseruna.

Heldur ikki núverandi málkøni stjórin á loysingarblaðnum Fregnir helt seg ov góðan til í síni móðurmálsgrein í tí annars ópolitiska mentanarálitinum "Avmarkaður Marknaður" 1996, at skíra danska samskiftið við Føroyar fyri "donsk imperialisma" endurtikið heili 5 ferðir ( s. 52,53 og 56), samstundis sum vælkenda hálovanin ella rættari kanoniseringin av teimum proloysingarhugaðu verður sett í fokus. Imperialisma er kúgan og vald yvir fremmandum landi og fólki. Men eins og í øðrum propagandamateriali verður als einki sagt um nakað alternativ, hvussu vit føroyingar uttan at vera partur av ríkisfelagsskapinum høvdu kunna ment og uppgraderað okkum til tað, vit eru í dag - eitt frælst og framkomið samfelag.

Okkara 600 ára gamli ríkisfelagsskapur hevur dugnað og stuðlað alt frá uppskrivingum og innsavningum til útbúgvingar av øllum handan slag. Við rúmsáttum arbeiðsumstøðum gjørt tað møguligt hjá eitt nú V. U. Hammarshaimb og okkara lærdu annars, at fáast við eitt táverandi breyðleyst ítriv, men sum seinni skuldi vísa seg sum kjølurin undir okkara máli og mentan. Ríkisfelagsskapurin hevur eisini dúgliga stuðla útgávum og veitt styrk til listarligar føroyskar úrmælingar - uttan mun til teirra politiska lit! Men gráa tøkkin: "Donsk imperialisma" - segði nakar útspilling?

Tað at vit føroyingar eru tvímálsligir og ikki bert hava heimamálið at líta á eigur ikki at geva málkønum nationalistisk kompleksir, tí so hevði verið synd í 70% av heimsins íbúgvum, sum verða roknaðir fyri at hava minst tvímálsligan førleika.

Í Indonesia eru til dømis yvir 13.000 oyggjar harav 4.000 við búseting og 200 móðurmál - øll undir einum aðalstýri, men tey hava helst ongan loysingarministara á lønarlistanum enn?

**Nationalistiskur verbalkøstur**
Eingin átala hoyrdist frá varaløgmanni, tá ein av loysingar sjefideologunum uttan fyri Hotel Hafnia uppí anliti á Nyrup samanbar Nyrup við Hitler, ella tá maritimi mentamálaráðharrin í Sosialinum skírdi Nyrup fyri ein svínhund. Nei, síðani varaløgmaður trein á politiska loysingarpallin við sínum danifoba hugburði, er tað líkasum vorðið alt meiri legalt at seta niðrandi nøvn á ikki loysingarsinnaðar føroyingar og heldur ikki her tróta orðini í nationalistiska verbalkøstinum: quislingur, landasvíkjari, danskaravinur, ikki rættur føroyingur v. fl..

Hinvegin kunnu vit tó kanska frøast um, at tað endiliga er gingið upp fyri varaløgmanni, at tað er ein heimur uttan fyri hansara narsistiska loysingarspegil, nú stórur partur av Føroya fólki í fleiri fylgjandi meiningarkanningum hevur vent loysingarpolitikkinum hjá honum baki.

**Lip service ella loysingarskrøgg sum mantra**
Sum ein annar Erasmus Montanus, ið ikki kendi til tær grundleggjandi logisku fortreytirnar og tí gjørdi falska niðurstøðu, legði varaløgmaður hart út í Sjónvarpi Føroya tá hann visualiseraði danska skurkin í bankasakini við eftirgjørdum myndum, men niðurstøðan var følsk smb. "Frágreiðingina um 80-árini." Niðanfyri nøkur dømir sum tala fyri seg.

* Lyftið til Føroya fólk frá varaløgmanni og løgmanni ultimo 1998 um breiðan meiriluta fyri nýskipanaruppskotinum varð ikki hildið og danir fingu skyldina.
* Loysingarrópini um at føroyingar fáa tað nógv betri uttan fyri ríkisfelagsskapin halda ikki, tí livifóturin lækkar smb. stjóran á hagstovuni!
* Uppáhaldið, um at danir tjena meir uppá Føroyar enn blokkurin kostar teimum, er ongantíð ávíst og er ikki eftirfarandið smb. serkønum!
* Føroyar hava hvørki brúk fyri Nato ella ríkisfelagsskapinum, var niðurstøðan hjá loysingarfylkingini, men terrorin hevur lært okkum annað, og uttan trygd frá ríkisfelagsskapinum fleyg Atlantic Airways helst ikki í dag.
* Flestu "rættu" føroyingar ynskja loysing frá Danmark verður sagt, men hetta er ikki rætt smb. meiningarkanningum!
* Føroyar skuldu gerast bíligari at reka við effektivisering, men eru vorðnar dýrari, eisini ein skeiv fortreyt.
* Pengar hava ikki so nógv at siga í einum fullveldis Føroyum, onnur virðir telja meiri, heldur varaløgmaður uppá, men politikaralønirnar eru hækkaðar til tað dupulta og pensiónin til landsstýrismenn er vorðin 5 falda tað Palliba fær. Heldur ikki her hanga orð og gerningar saman, og soleiðis kundu vit hildið áfram við at tikið úr dreymaheiminum hjá loysingarfylkingini. Teirra hugsjón er on/off, og hevur tíverri hvørki nú ella tey seinastu 50 árini havt rygg til vanliga fólkaræðisliga viðgerð.

Varaløgmaður hevur við lip service ella loysingarskrøggi sum mantra (heilagt orð/útsagn frá guru) gingið uttanum fólkaræðisliga atferð og snarað politiska leikpallinum frá eini nýskapandi Erasmus Montanus konfiguratión til eina sjálvsøkna talibanlíknandi rørslu við elimentum, sum okkara fólkaræðið hevði verið ríkari fyriuttan!

Samríkissinnaða anstøðan tykist at hava sannað, at " med ræv skal man ræv fange", og tí kastar eisini hon til tíðir úr tí nationalistiska verbalkøstinum. Hetta er eitt "nødvendigt onde" men er í longdini óvirðiligt og spillandi fyri okkara fólkaræði.

Men varaløgmaður liggur sum hann hevur reitt, og átti fyrst at sópa fyri egnum durum, áðrenn hann vendir sær til onnur. Hann átti at vita, at við oratoriskum førleika fylgir ábyrgd og misbrúk av professionell-um fjølmiðlaførleika er helst stórsta hóttanin ímóti okkara aldargamla fólkaræði!

# MBF føðingardagshald í Norðurlandahúsinum

TÍÐINDASKRIV

**MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C, er stongt mikudagin 24. oktober, vegna stóra føðingardagshaldið í Norðurlandahúsinum frá kl. 13.00 til 17.00**

Skráin er henda:
Kl. 13.00:
Básarnir lata upp:
- Did Nicolaisen »Heilsa og Kostur«
- Margretha Næss »Ljóðbøkur«
- MBF. Ymist tilfar
- Medisinski bólkurin
- Rørslubólkurin
- Sálarlig/Neurologisk Brek
- Samskiftisbrek

Kl. 13.00–14.00:
- Psyka og Rørsla. Randi Petersen, fysioterapeutur

Kl. 14.00–15.00:
Sangur og tónleikur
Kl. 15.00–16.00:
Tveir fyrilestrar í Dansistovuni:
- Nýmótans samskiftistøkni. Robert Magnussen, Fø. Tele
- Heilivágur núg í framtíðini. R. Schwartson, farmaceutur

Kl. 16.00:
Stuðul frá fløguni »Vælskapt Brek verður handaður.
Doris Hansen, røða
Orkestrið Ælabogin endar dagin
Liðugt kl. **17.00**

# Føroyar sum terroristamál

**Símun A. Klein**
*9800 Hjørring*

Viðvíkjandi teim hernaðarligu fregnartólum, ið eru sett upp í Føroyum, so eru tað enn tann dagin í dag eingin av íbúgvunum í Føroyum, sum veit nakað sum helst um, hvat ið tað eru fyri fregnartól, sum eru plantaði í Føroyum av dønum. ( Tó kanska undantikið teir donsku, loyalu socialpedagogarnir úti á Tinganesi, 32 í tali ).

Haraftrat valdar stórur ivi um millum manna, um nú hesi fregnartól eru Nato fregnartól ella tey eru rein amerikansk, hvar í Danmark hevur havt ein ovurhonds stóran vinning burtur úr hesum tólum, peningaliga sæð. Eisini hettar er framvegis eitt loynimál fyri hin vanliga føroyska borgaran.

Aftrat øllum hesum kemur so eisini tann ómenniskjansligi framferðarháttur-urin yvir fyri tann vanliga, føroyska borgaran, at hann als ikki varð eftirspurdur áðrenn hesum viðvíkjandi, tá ið fregnartólini vóru sett upp í Føroyum. - leingi livi tað danska demokratiið í Føroyum eins og í 1946 og 1972 o.s.fr..

Men hvør er so hin sanna søgan um áðurnevndu fregnartól í Føroyum ???

Er tað framvegis klassificera sum »TOP-HEMMELIGT?«

Tí, at um so er, at hesi fregnartól í Føroyum eru rein amerikansk, so eru Føroyar eisini eitt 100% upplagt terroristmál.